
Elsar Sætre, stjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil umhugsar at gera nýggjar íløgur í oljuídnaðin

**Jógvan Hugo Gardar**

03.05.2015 - 22:01

Oljan.fo

Stjórin í Statoil, Eldar Sætre, heldur ikki at tað er ræðandi við lága oljuprísinum og virðunum fyri milliardir sum hvørva í USA. Sambært Dagens Næringsliv er hann sinnaður at keypa meir.

Hósdagin niðurskrivaði Statoil virðir fyri 46 milliardir norskar krónur. Meginparturin av hesum var frá ognum sum fyritøkan hevur keypt í USA farnu árini.

- Statoil vil altíð leita eftir góðum møguleikum til at menna fyritøkuna. Lækkandi oljuprísir geva slíkar møguleikar, sigur Sætre sambært Dagens Næringsliv.

Til spurningin um hann heldur at løtan er at keypa meir, sigur hann at tá okkurt er bíligt, so kann tað vera eitt meir passandi høvi enn tá ting eru dýr.

Oljugreinarin Teodor Sveen-Nilsen hjá meklarafyritøkuni Swedbank, sigur at Statoil hevur kanska brent seg eitt sindur í USA, og at fyritøkan tí helst heldur hugsar um at keypa aðrastaðni, til dømis á norska landgrunninum